# Søgan hjá leiðandi st

**Sosialurin fer komandi vikurnar at royna at birta ljós um viðurskifti í eini greinarøð um íslendskan politikk og serliga tær síðurnar, sum horva ella partvíst horva móti okkum føroyingum. Eitt eitt nú ES-spurningurin, fiskivinnufyrisiting og umhvørvi. Greinirnar byggja ymiskt á viðtøl við oddafólk í teimum ymsu flokkunum og ymiskt verður roynt at gera grein fyri søguni, tí hugsjónarliga grundarlagnum og áherðslunum hjá flokkunum í valstríðnum, sum nú streingir á. Vit fara at leggja fyri við Sjálfstæðisflokkinum**



REPORTASJA



*Reykjavík*
*Carl Jóhan Jensen*

Sjálfstæðisflokkurin ella Sjálvstøðisflokkurin varð stovnaður í 1929 burtur úr tveimum eldri flokkum. Íhaldsflokknum (Afturhalds- ella Konservativa flokkinum), ið var stovnaður í 1924, og Frjálslynda flokknum (Frælslyntaella Liberala flokkinum), sum var grundaður 1926. Íhaldsflokkurinn var nógv tann størri av hesum báðum flokkum, ið ávikavíst fingu 42,2 og 5,8 prosent av atkvøðunum á Altingsvalinum í 1927.

Í Føroyum verður mangan hildið, at íslendingar tóku sjálvræði ella loystu á sumri í 1944, hin 17. juni, tá ið lýðveldið Ísland varð stovnað. Hetta er tó ein misskiljing. Tað rætta er at í juli í 1918 fóru samráðingar fram í Reykjavík millum danir og íslendingar um íslendskt sjálvstýri. Úrslitið av samráðingunum var hin sonevnda Sambandslógin. Á heysti 1918, meðan spanska sjúka geisaði, var síðani fólkaatkvøða. Á hesi fólkaatkvøðu valdu íslendingar at taka fulla ábyrgd av egnum viðurskiftum, og frá 1. desember gjørdist Ísland sjálvstøðugt land í kongsfelagsskapi við Danmark.

Ellivu ár vóru sostatt liðin frá fullveldistøkuni, tá ið Sjálfstæðisflokkurinn varð stovnaður og onnur mál komin ovari á breddan í íslendskum politikki enn viðurskiftini við Danmark, eitt nú hvussu búskapur skuldi fáast í vinnulívi, nýskipan av landbúnaðinum, korini hjá verkafólki o.s.fr.

Orðið sjálvstøði í floksnavninum sipar tí ikki, sum høvi kundi verið at halda, til tjóðfrælsisspurningin, men harafturímóti til hugburðin, ið stovnararnir, serliga fyrsti floksformaðurin, Jón Þorláksson, høvdu til vinnulív og marknaðarviðurskifti. Hugsjónarliga grundstøðið hjá flokkinum hevur altíð verið og er enn hugmyndin um fræls marknaðarviðurskifti, t.e. at vinnulívið ikki skal vera í ríkishondum, tvørturímóti leggur flokkurin dent á, at einstaklingsframtakið (undir samfelagligari ábyrgd eyðvitað) fær so rúmar ræsur sum gjørligt, tí, verður sagt, almenn stýring gagnar ikki, hon tálmar vinnuligum framvøkstri og vælferðini sum heild. Myndugleikar eiga, øðrvísi sagt, ikki at hava forræði yvir einstaklinginum, hann greiðir sjálvur at velja. Hinvegin eigur tað almenna at seta karmar, sum tryggja at frælst val er møguligt á mongum økjum sum gjørligt.

Sammett við aðrar borgarligar flokkar í Norðurlondum hevur flokkurin frá byrjan hildið seg í tí borðinum, sum hugsjónarliga er vindvart. Fleiri teirra, sum umboðaðu flokkin á tingi í tretivunum, eitt nú Ólafur Thors, Bjarni Benediktsson o.fl. vóru ung og róttøkin (summi so ung, at tey enn eru virkin í flokkinum heilt fram í 1980 árini t.d. Gunnar Thoroddsen).

At Sjálfstæðisflokkurin soleiðis kundi vísa reinari lit hugsjónarliga enn samsvarandi flokkar aðrastaðni var eingin tilvild.

Í fyrsta lagi er Ísland í hesum árum eitt samfelag, sum til tað nýliga var farið gjøgnum hamskiftið frá bónda- til nýtíðarligt ídnaðarsamfelag. Sjálfstæðisflokkurinn var tí ikki í sama mun sum brøðraflokkar í hinum norðurlondunum darvaður av atlitum til fast inngrógvin sjónarmið hjá eini yvirstætt, sum kanska hevði lyndi til at virða fortíðina og serrættindi síni fram um samtíðina, øðrvísi krøv hennara og broyttu áherðslur.

Í øðrum lagi verður flokkurin til í eini tíð, sum vinnuliga lá í hafti, hóast skjót og munagóð uppbygging var bráðneyðug á øllum samfelagsøkjum, skuldi íslendska fullveldið ikki fara fyri bakka.

Sjálfstæðisflokkurin fór fyrstu ferð til val á kommunuvalinum í 1930 og fekk tá næstan hálvtrýss prosent av atkvøðunum í keypsstøðunum. Á Altingsvalinum í 1931 fekk flokkurin 42,2 prosent av atkvøðunum og hevur alt síðani fingið millum 30 og 40 prosent av atkvøðum á Altingsvalum. Vánaligasta valið flokkurin hevur havt var í 1987, tá fekk hann 27,2 prosent av atkvøðunum. Við øðrum orðum hevur flokkurin havt eina óvanliga sterka støðu í íslendskum politikki hesi skjótt 80 árini hann hevur virka. Hetta hóast hann tey fyrstu árini, í tretivunum, fekk nógv færri tingmenn, enn hann hevði atkvøður til. Orsøkin til tað var tann valskipan (ein fyrstvaldarskipan), ið tá var í Íslandi (á valinum í 1931 fekk flokkurin t.d. bert 12 tingmenn, meðan Framsóknarflokkurinn, sum hevði dygga undirtøku á landsbygd, fekk 23 tingmenn, men bert sløk 25 prosent av atkvøðunum).

## Eftirkrígsárini

Tað er ikki ov nógv sagt, at Sjálfstæðisflokkurinn í eftirkrígsárunum hevur havt eina støðu í íslendska samfelagnum sambæriliga við hana, ið Socialdemokratarnir hava havt í Svøríki og Danmark og Arbeiðaraflokkurin í Noregi. Kortini hevur Sjálfstæðisflokkurin ongantíð einsamallur havt meirilutan landspolitiskt, men nógvastaðni hevur hann tó valskeið eftir valskeið havt reinan meiriluta í býar- og bygdarráðum, eitt nú í Reykjavík.

Nú kann tað tykjast løgið, at ein flokkur so treytaleyst høgrasinnaður í sínum politisku áherðslum, kortini hevur evnað at fingið so góðan ljóðbotn í íslendska fólkinum fyri stevnumiðum sínum. Samanbera vit við Norðurlondini (og Ísland er, tað svitast ikki, eitt norðurland, bæði í mentan og stjórnmálum), so hava flokkar, ið byggja á somu hugmyndaligu grund sum Sjálfstæðisflokkurin sjáldan ella ongantíð havt breiða undirtøku, ið hvussu er ikki í eftirkrígsárunum.

Hvussu ber tað so til, at flokkurin hevur havt so breiða undirtøku millum veljarnar so leingi?

Ja, tað er ikki lætt at ætla um.

Ein orsøk kann vera, at flokkurin øll árini hevur havt eina æðr í sær av sosialum medviti og ongantíð gjørt seg blindan (ella í øllum førum ikki starblindan) fyri teimum trupulleikum, ið vanligt lønarfólk hevur at dragast við.

Eisini hevur flokkurin í málflutningi sínum, og ikki úrslitaleyst, roynt at hvørkisgera stættamunin